# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Til minnis um Henriettu Johansen

**f. 30.04.1993 – d. 10.04.2009**

*Vit minnini eiga um eygu so klár,*
*um dárandi ennið og vælkembda hár,*
*tey eygu, sum gimsteinar glógvaðu tey,*
*tá skálkabrosið um varrarnar fleyg.*

*Tú ei kundi dansa og renna um teig,*
*men gleðast um tónleik og blómur í mai.*
*Tú lærdi okkum at dýrmeta tað,*
*sum ikki kann vigast, men hjørtu ger glað.*

*Um ofta var lagnan og lívið tær hart,*
*øll fjálgaðu um teg, har einki var spart.*
*Hjá móður og faðir tú sólstrálan var,*
*og systkini eisini teg høvdu so kær.*

*So tómligt man tykjast í heiminum nú,*
*tú heima í Himli tók æviga búð,*
*har saman við hinum, sum fóru, tú er*
*má Gud tykkum styrkja í sakninum her.*

**Vit í serstovuni**



## †

## Andlát og jarðarferðir

**Ingrid Joensen, fødd Anthoniussen, Froðba,** andaðist týsdagin, 86 ára gomul.

**Ingrid Mikkelsen, fødd Magnussen,** ættað úr Fuglafirði, búsitandi í Vági, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi mánadagin, 72 ára gomul.

**Elisabeth Maria Hartman Niclasen,** vanliga nevnd Betta, andaðist á Suðuroyar Ellis- og Røktarheimi mánadagin, 85 ára gomul.

**Arngrim Johansen,** ættaður úr Miðvági, andaðist í Keypmannahavn, 22. juni, 76 ára gamal.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg øllum, sum mintust meg á 80 ára degnum, tann 2. juni.

*Vinarlig heilsan*
**Sanna Skaalum, Vágur**

## Una Hansen 60

Í dag fyllir Una Hansen í Nólsoy 60 ár.

Una er fødd og vaksin upp í Nólsoy, har hon eisini hevur búð og starvast alt sítt lív.

Hon vaks upp í einari tíð, tá tað langt frá var vanligt, at ungdómurin valfartaði til Havnar at nema sær útbúgving, og tað kann kanska tykjast undarligt í dag, tí hennara lívsstarv var næstan avgjørt, tá hon varð fødd.

Hon er miðlinga barn hjá Merry og Anfinni Poulsen og einasta genta av trimum systkjum. Foreldrini høvdu handil, sum Anfinnur byrjaði, áðrenn hann var myndugur, og tí mátti pápi hansara, Kjeld Poulsen, abbi Unu, standa fyri handlinum. Og tað gjørdi hann, líka til hann doyði. Síðani varð navnið flutt yvir í navnið á Anfinni.

Una byrjaði tíðliga at arbeiða í handlinum, og burtursæð frá einum skeiði



á Háskúlanum og øðrum stuttum tíðarbilum hevur hon gingið fólki til handa sum »ekspeditrisa«.

Tá foreldrini so doyðu stutt eftir annað miðskeiðis í 90-árunum, hevði Una longu í mong ár staðið fyri og rikið handilin. Eftir at hon formliga yvirtók hann valdi hon at geva handlinum navnið »Hjá Anfinni«.

Una helt fram at handla í fleiri ár eftir hetta, til hon fyri nøkrum árum síðani valdi at gevast og í staðin fyri fyrstu ferð í lívinum at gerast leys av ábyrgdini av einum handli.

Í sínum uppvøkstri upplivdi hon »tey glaðu 60-ini«, tá samanhaldið millum tey ungu í Nólsoy var framúr gott. Tað var tí heldur ikki so løgið, at hon fann sær sín lívspartnara í bygdini, og fyri tíggju árum síðani kundu hon og maðurin, Sune, halda silvurbrúdleyp.

Una hevur eisini øll árini verið virkin innan felagslívið í Nólsoy. Heilt síðani sangkórið byrjaði í 1988 og til tað – tíverri – datt niður fyri fyri nøkrum árum síðani, vóru hon og maðurin tveir av grundstuðlunum.

Una gjørdist eisini ein av fyrstu – kanska enntá tann fyrsti – kvinnuligi deknurin í Føroyum, eitt starv, hon røkir enn. Maðurin hevur somuleiðis verið kirkjutænari í mong Harrans ár sum urguleikari.

Eisini hevur Una í mong, mong ár verið partur av Ovastevnunevndini, og er aktiv har enn.

Og nú, tá hon hevur fingið nógv betri tíð, er hon javnan at finna í sølubúðini hjá Heimavirkinum í Nólsoy.

Su m nevnt giftist Una við Suna í 1974, og eiga tey børnini Ann-Mari, nú av Skarði, gift Jákupi, útbúgvin lærari, Leif Hansen, giftur Anne Mette Greve Klemensen, og útbúgvin cand. mag. í tónleikavísund, og Katrin, sum er útbúgvin løgfrøðingur. Eisini eigur Una seks ommubørn.

Eg fari at ynskja Unu, systir, hjartaliga tillukku við teimum 60 og vóni, at hon og familjan fáa ein góðan dag og eisini mong góð ár frameftir.

**Leo**

**Dagurin**
**24. juni. Jóansøka.**
Føðingardagur Jóhannes Doyparans. Minningardagurin hjá halgimennum var vanliga deyðadagur teirra, men hjá Johannes Doyparanum er tað føðingardagurin, ið verður hildin, av tí at hann var heilagur longu í móðurlívi.
*(Axel Tórgarð: Dagar og nøvn í álmanakkanum, 2. broytta útgáva 2008)*

## Listaframsýning við Áarvegin

Í hesum døgum hevur Anna Kathrina Højgaard fotografur eina framsýning við listaverkum, sum hon hevur greitt úr hondum seinastu tvey árini.

Framsýningin er á Áarvegi 14. Talan er um málningar, grafikk og foto, tilsamans 26 listaverk umframt ymiskar plakatir, sum hon eisini hevur gjørt.

Anna Kathrina er útbúgvin fotografur, men dugir meira enn at taka myndir. Í listarligum høpi er hon ikki ókend í Føroyum. Hon hevur havt fleiri framsýningar, bæði her heima og uttanlands. Nú er so aftur høvi at síggja hennara fjølbroyttu listarligu evni á framsýningini við Áarvegin.

Opið er frá allar dagar frá 11-18, tó sunnudagin frá kl. 15-20. Framsýningin er opin til og við 2. juli.



*Anna Kathrina Højgaard hevur í hesum døgum listaframsýning við Áarvegin*
*Mynd: Jens Kristian Vang*